# Lærusáttmáli

**GEV GÆTUR!**
**Les vegleiðingina á blaðsíðu 5 væl áðrenn sáttmálin verður útfyltur.**

## millum

Lærupláss (navn á virki):

Deildin ella staðið, har upplæringin fer fram:

*Gøtunavn og nr.* — *Postnr.* — *Bygd/býur*

*V-tal* — *Telefonnr.* — *Teldupostur*

*Navn á yrkislærda/lærumeistara, ið stendur fyri upplæringini* — *Føðingardagur lærumeistarans*

## og

Lærling:
*Navn á lærlingi*

*Gøtunavn og nr.* — *Postnr.* — *Bygd/býur*

*P-tal* — *Telefonnr.* — *Teldupostur*

## um

Heiti á yrkisútbúgving:

Heiti á sergrein (bert um talan er um danskan skúla):

Profilur (bert um talan er um danskan skúla):

Vel skúla til útbúgvingina, sum tú fert undir:

*Glasir (Tórshavn)* ☐ *TSK (Klaksvík)* ☐ *Annar* ☐ ______ (Navn á skúla)

## Tilskilað Yrkisdeplinum

*Góðkenningardagur* — *Undirskrift*

Hesin sáttmáli er heimilaður í læruplássgóðkenning (dagf. og journalnr.)

Broyting:

| *Dato* | *Orsøk* | *Undirskrift* |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |

## 1. Útbúgving

Set X (Avrit av próvskjølum skulu leggjast við)

☐ Hevur fylgt undirvísingini til fráfaringarroynd fólkaskúlans (9. flokkur)

☐ FHS ☐ Fyrireikingarbreyt

☐ Búskaparbreyt ☐ Tøknibreyt ☐ Náttúrubreyt ☐ Tilfeingisbreyt ☐ Hugbreyt

☐ Yrkisnám 1 ☐ Yrkisnám 2 Yrkisgrein: ______________________________

☐ Lokin yrkisútbúgving: ______________________________

☐ Onnur útbúgving: ______________________________

## 2. Starvsroyndir í sambandi við møguliga stytting av lærutíð

Sambært § 35 í yrkisútbúgvingarlógini kann útbúgvingin styttast, um lærlingur, áðrenn læran byrjar, hevur lokið aðra fakliga útbúgving ella havt viðkomandi arbeiðsroyndir.

☐ Hevur ongar starvsroyndir

☐ Hevur viðkomandi starvsroyndir **(sí niðanfyri):**

Verður søkt um stytting vegna viðkomandi starvsroyndir, skulu hesar skjalprógvast við serstakari váttan frá arbeiðsgevara, har upplýst verður:

- Navn á virki/stovni, har arbeiðsroyndirnar eru fingnar
- Tíðarskeið fyri starvssetan, við upplýsing um fyrsta og síðsta arbeiðsdag
- Longd av arbeiðsviku
- Stuttari lýsing av arbeiðsuppgávum í hesum tíðarskeiði

**NB** Umsókn um stytting vegna starvsroyndir verður einans viðgjørd, um váttanin hevur undirskrift arbeiðsgevarans.

## 3. Sáttmálaskeið

**Lærusáttmálin kemur í gildi**

☐ góðkenningardagin (móttikin í Yrkisdeplinum)

☐ ______________________________
*Dato*

**Gev gætur!**
Lærusáttmálin kann í fyrsta lagi vera galdandi frá tí degi, Yrkisdepilin hevur móttikið sáttmálan.

## 4. Tilskilað Yrkisdeplinum at fylla út

Ásetta lærutíðin er sambært galdandi útbúgvingarkunngerð ____ ár og ____ mánaðir

Lærutíðin byrjar tann ________________

| **At fylla út í sambandi við útbúgving við danskari skúlagongd** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Grundarlag fyri áseting av útbúgvingarlongd: | Ungdómsútbúgving ☐ | EUV1 ☐ | EUV2 ☐ | EUV3 ☐ |
| Stytting av skúlatíð: | | | | |
| Góðskriving: | | | | |

Stytting ☐ *Nei* ☐ *Ja* vegna ______________________________

Framhald á næstu síðu

## 4. Tilskilað Yrkisdeplinum at fylla út (framhald)

Longd av stytting ________________________________

Lærutíðin endar tann ______________________________

Broyting av lærutíð vegna: ______________________________________________ Nýtt endadato: ________________________

Broyting av lærutíð vegna: ______________________________________________ Nýtt endadato: ________________________

Broyting av lærutíð vegna: ______________________________________________ Nýtt endadato: ________________________

Eru viðmerkingar, sí punkt 10: "*Viðmerkingar/Broytingar*"

## 5. Virkislýsing

Virkið skal hava læruplássgóðkenning innan yrkið, ið talan er um.

**Gev gætur!** Læruplássgóðkenning verður givin fyri eitt 5 ára tíðarskeið. Er góðkenningarskeiðið útrunnið, skal læruplássið søkja um at fáa nýggja góðkenning. Hetta skal gerast áðrenn nýggjur lærusáttmáli verður settur í gildi.

Núverandi tal av yrkislærdum á virkinum við somu útbúgving sum lærlingurin sambært hesum sáttmála: __________

Núverandi tal av yrkislærdum á virkinum við samsvarandi útbúgving sum lærlingurin sambært hesum sáttmála: __________

Tal av lærlingum á virkinum, í somu útbúgving, sum lærlingurin í hesum sáttmála (íroknað lærlingin í hesum sáttmála): ________

## 6. Lønar- og arbeiðsviðurskifti

Arbeiðstíðin er _______ tímar um vikuna. Lønarútgjaldsdagur: ____________ Í skúlatíðini fær lærlingurin vanligu sáttmálalønina ☐

Lærlingurin er fastløntur ☐ tímaløntur ☐ sambært galdandi sáttmála millum:

☐ Sambært galdandi sáttmála millum Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna

A: Handverkari við føstum arbeiðsstaði ☐ Skriva adressu: ________________________________________

B: Handverkari við skiftandi arbeiðsstaði ☐ C: Handverkari, sum veitir kundum tænastur ☐

☐ Sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið

☐ Sambært galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Samverk

☐ Sambært galdandi sáttmála millum ________________________________________

☐ Lærlingurin fær hægri løn enn galdandi sáttmáli ásetir, íalt kr.* ___________ um vikuna ☐ um mánaðin ☐ eisini í skúlatíðini ☐

☐ Lærlingurin fær hægri løn enn galdandi sáttmáli ásetir, íalt kr. ___________ meira enn sáttmálalønin ☐ eisini í skúlatíðini ☐

*) Her skulu partarnir tryggja sær, at ásetta upphæddin er hægri enn endalønin hjá lærlingum sambært sáttmálanum

Í sambandi við løn, feriu og sjúku verður víst til galdandi sáttmála millum lønarsáttmálapartarnar og til frítíðarlógina

## 7. Útisetaavtala

Sambært galdandi lóg kann partur av læruni fara fram á øðrum virki (útisetavirki) í ávíst tíðarskeið eftir avtalu millum sáttmálapartarnar.

Navn á útisetavirki ____________________________________________________________________________

V-tal ___________________ Tíðarskeið fyri upplæringina á útisetavirkinum ________________________________________

Læruplássgóðkenning (dagf. og journalnr.) ___________________________

Innihaldið í tí partinum av verkligu læruni, sum lærlingurin skal hava á "útisetavirkinum": ___________________________________

_____________________________________________________________________________________________

_______________ *dagfesting*

____________________________________ *Undirskrift leiðarans á útisetavirki*

## 8. Undirskriftir

Við ásetingunum í galdandi regluverki viðvíkjandi yrkisútbúgvingum og við treytum í hesum sáttmála verður hesin sáttmáli undirskrivaður.

_______________
*dagfesting*

_______________________________
*Undirskrift virkisleiðarans*

_______________________________
*Undirskrift lærlingsins*

_______________________________
*Undirskrift verja lærlingsins*
(um lærlingurin er undir foreldramyndugleika)

| | | |
|---|---|---|
| *Navn verjans* | *Teldupostur* | *Telefon* |

Hesin sáttmáli, hvørs sáttmálaskjal er góðkent av Yrkisútbúgvingarráðnum og landsstýrismanninum, er í samsvari við galdandi lóg um yrkisútbúgvingar og tær reglur, sum eru settar í gildi við heimild í nevndu lóg.

Sambært lógini skal lærusáttmálin vera undirskrivaður og góðkendur av Yrkisdeplinum, áðrenn lærutíðin byrjar. Teir fyrstu 6 mánaðirnir eru at rokna sum royndartíð, tó frároknað skúlagongd. Sáttmálapartarnir kunnu ikki gera broytingar ella ískoyti í sáttmálanum uttan loyvi frá Yrkisdeplinum.
Partarnir geva við síni undirskrift loyvi til, at upplýsingarnar í hesum skjali kunnu verða lætnar øðrum myndugleikum, til tess, at Yrkisdepilin endaliga kann viðgera og góðkenna sáttmálan.

## 9. Tilskilað sáttmálapørtunum til viðmerkingar

## 10. Tilskilað Yrkisdeplinum til viðmerkingar/broytingar

# Vegleiðing um útfylling av lærusáttmálanum

Sáttmálapartarnir skulu útfylla alt oyðublaðið. Vinarliga nýtið teldu ella blokkbókstavir. Gevið gætur, at nøvn og dagfestingar mugu vera rætt skrivað. Sáttmálin skal útfyltur og undirskrivaður sendast til **yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo**.

**Forsíðan:**

Í teiginum "Lærupláss" verður skrivað navn á virki, gøtunavn og nummar, postnummar og bygd/býur umframt V-tal, telefonnummar og teldupostadressa. Tilskilast skal eisini hvar lærustaðið er (t.d. deild, gøtunavn og gøtunr. evt. matrikulnr.)

Í teiginum "Lærling" verður skrivað navn á lærlingi (fult navn), gøtunavn, postnummar og bygd/ býur umframt P-tal, møguligt telefonnummar og teldupostadressa.

Í teiginum "Yrkisútbúgving" skrivar tú heitið á útbúgvingini, sum lærlingurin fer undir. Tað er sera umráðandi, at útbúgvingarheitið er rætt. Er skúlagongdin í Danmark, skulu møgulig sergrein og profilur eisini upplýsast. Á s. 6 er yvirlit yvir yrkisútbúgvingarnar, flokkaðar í útbúgvingarbólkar. Undir hvørjum útbúgvingarbólki eru fleiri útbúgvingarheiti. Finn útbúgvingina, sum lærlingurin fer undir, og skrivið heitið í teigin á fremstu síðu.

**Á síðu 2, 3 og 4 eru teigarnir talmerktir og skulu fyllast út soleiðis:**

1. Í teigi 1 skal upplýsast, um lærlingurin hevur lokið ávísa útbúgving eftir fólkaskúlan. Hevur lærlingur lokið SIT-útbúgving skal upplýsast hvørja breyt hann/hon hevur tikið. Tað verður viðmerkt í teigin 'Lokin yrkisútbúgving'. Avrit av prógvi skal leggjast við.
2. Í teigi 2 verður upplýst, um lærlingurin hevur starvsroyndir ella ikki. Um so er, skal tað skjalprógvast á hjáløgdum fylgiskjølum.
3. Í teigi 3 verður skrivað, nær sáttmálin tekur við. Sambært ásettu reglunum kann lærutíðin í fyrsta lagi byrja tann dagin, Yrkisdepilin hevur góðkent sáttmálan. Sáttmálin skal vera Yrkisdeplinum í hendi, áðrenn lærusáttmálin kann verða góðkendur.

**Rindið umsitingargjaldið (kr. 3.000,-) á kontu 6460-260.005.8 í BankNordik og viðmerk navnið á lærlinginum. Almennir stovnar kunnu flyta gjaldið umvegis høvuðsbók.**

Gjaldið fyri lærusáttmálan skal vera Yrkisdeplinum í hendi, áðrenn góðkendi lærusáttmálin verður útflýggjaður pørtunum.

4. Teigur 4 er tilskilaður Yrkisdeplinum at fylla út.
5. Í teigi 5 verður upplýst, um virkið er góðkent sum lærupláss innan yrkið, ið søkt verður um, umframt tal av yrkislærdum á virkinum. Ávísar treytir eru, ið eitt virki skal lúka sum lærupláss, har ímillum, at samsvar er millum talið av yrkislærdum og talið av lærlingum. Læruplássið skal tí upplýsa talið á yrkislærdum við somu útbúgving, sum lærlingurin fer undir. Lærlingurin, sum hesin sáttmáli fevnir um, skal íroknast talið á lærlingum.
6. Í teigi 6 verður upplýst um lønar og arbeiðisviðurskifti. Lønin, sum eitt lærupláss skal rinda lærlingi, skal vera ásett í lærusáttmálanum, og skal lønin í minsta lagi vera hon, ið ásett er í sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg. Set kross við galdandi lønarsáttmála. Er onnur avtala um lønina partanna millum, skal hon upplýsast. Set kross, hvørt lærlingurin fær serliga avtalaðu lønina ella vanligu sáttmálalønina meðan hann er í skúla.
7. Í teigi 7 verður tilskilað, um partur av læruni fer fram á øðrum virki. Sambært § 28 í lóg um yrkisútbúgvingar kann lærusáttmáli verða gjørdur við fleiri lærupláss, og skal tá gjølla tilskilast, hvørjum parti av útbúgvingini tað einstaka læruplássið hevur ábyrgdina av. Somuleiðis kann eitt lærupláss vegna avmarking í læruplássgóðkenningini hava skyldu at lata lærling taka ein verkligan part á øðrum lærupláss. Um so er, at ein partur av læruni verður tikin á øðrum virki/lærupláss, skal hetta greitt tilskilast her.
8. Í teigi 8 verður dagfest, nær sáttmálin er undirskrivaður av lærupláss og lærlingi. Lærusáttmálin er ikki galdandi fyrr enn Yrkisdepilin hevur móttikið og góðkent hann.
9. Í teigi 9 ber til at gera ávísar viðmerkingar, sum sáttmálapartarnir halda hava týdning fyri sáttmálaviðurskiftini.
10. Teigur 10 er tilskilaður Yrkisdeplinum at gera viðmerkingar.